NORÐURLANDAHÚSIÐ

# Skrivstovu-lærlingur

**Læruplássið**
Lærupláss, sum skrivstovulærlingur innan fyrisiting, er leyst at søkja í Norðurlandahúsinum. Umsóknin skal merkjast "Skrivstovulærlingur".

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarin hevur lokið HH, HF, student- ella FHS- prógv. Tað er ein fyrimunur at hava góðan málkunnleika, umframt at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og er áhugaður í mentanarligum virksemi.

**Setanar- og lønartreytir**
Viðkomandi verður settur eftir reglunum um skrivstovulærlingar í lønarsáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið/Yrkisdepilin. Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja 15. august ella 1. september 2006.

**Umsókn**
Umsóknin má verða Norðurlandahúsinum í hendi í seinasta lagi 28. mai 2006.

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
postboks 1260
110 Tórshavn
Telefon 351351
Telefax 351350
e-mail: nlh@nlh.fo

# Kunngerð

Frá 1. mai 2006 eru upplatingartíðirnar á Endurnýtsluvirkinum broyttar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Týsdag | kl. 17.00-20.00 |
| Hósdag | kl. 17.00-20.00 |
| Leygardag | kl. 13.00-18.00 |

Nes kommuna


Lesið Sosialin - so eru tit við



Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið
við
brúktum
bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin
tlf 341800



-tað loysir seg


**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til bráðfeingisdeildina G1

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir tveimum sjúkrarøktarfrøðingum til G1 at arbeiða í skiftandi vaktum í starvsbrøki 0,8 frá 1. juni til og við 30. november 2006, og eitt tíðaravmarkað starv í starvsbrøki 0,8 frá 1. august 2006 fram til 28. februar 2007.

**Deildin umfatar:**
- skaðastovu
- bráðfeingis móttøku
- dagkirurgi
- viðrakning
- intensiv

Deildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum og starvssetti kemur eftir tørvi at hava ymiskar arbeiðsuppgávur á deildini. Deildin hevur seingjarpláss til 4 sjúklingar í dagkirurgi, 5 sjúklingar í viðrakning og 5 intensivar sjúklingar.

Arbeiðsøki fatar í høvuðsheitum um røkt og viðgerð til sjúklingar á skaðastovuni og í bráðfeingis móttøkuni, sjúklingar í dagkirurgi, sjúklingar í viðrakning og intensivar sjúklingar

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar

**Krøv til umsøkjararnar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- fakligar royndir at viðgerða og røkta sjúklingar við bráfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- intensiva eftirútbúgvin

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Margrethu Petersen, deildarleiðara á G1, tlf. 304500, lokal 5811, e-postur mape@lsh.fo ella Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur ceci@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. mai 2006 kl.12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*


Sosialurin
Sosialurin i